UTTAN ÚR HEIMI

# Vakt við skipini hjá A. P. Møller

**Stóra danska reiðaríið heldur tað vera neyðugt at betra trygdina orsakað av vandanum fyri yvirgangsatsóknum**

Hóttanin um nýggjar yvirgangsatsóknir fekk í gjár danska reiðaríið A. P. Møller at herða trygdarreglurnar. Avgerðin ber í sær, at nú skulu skip, sum liggja inni, hava vakt við landgongina. Reglan umfatar øll skipini hjá felagnum og er galdandi, sama hvar í heiminum skipini liggja.

Tekniski stjórin hjá A. P. Møller, Ole Høg, sigur, at vanliga hava teir ikki vakt við landgongina, men at teir hava valt at gera tað, soleiðis um viðurskiftini eru vorðin.


*Savnsmynd*

Vanliga sleppa óviðkomandi ikki umborð á skipini hjá A. P. Møller, tí nógva staðni eru havnirnar girdar inni við hegni pg píkatráði, og tað er ikki vorðið léttari at sleppa fram at skipunum eftir yvirgangsatsóknirnar í USA.

Ole Høg sigur, at teir hava altíð ein stýrimann og ein dekkara á vakt, tá skipini liggja inni, men nú skal ein dekkari eisini standa á vakt við landgongina. Hann skal hava samskiftisútgerð uppi á sær, soleiðis at hann altíð kann varskógva hinar báðar, skuldi okkurt hent.

Tekniski stjórin hjá A. P. Møller vil ikki siga, hvussu stóran teir meta vandan fyri yvirgangsatsóknum at vera, og hann vil heldur ikki siga, um reiðaríið setir ymisk trygdarkrøv til tær einstøku havnirnar.

## Í hernaðarsigling

Hinvegin er lítið at ivast í, at júst skip hjá danska reiðarínum kunnu gerast álopsmál. A. P. Møller hevur í mong ár havt sera gott samband við amerikanarar og amerikanskar myndugleikar, og tá Flógvakríggið var fyri tíggju árum síðani, fluttu skip hjá reiðarínum herútgerð til Persaflógvan, uttan at amerikanararnir rindaðu fyri flutningin.

Herumframt eigur felagið 29 skip, sum eru leigað amerikanska herflotanum. Nøkur teirra liggja í havn ymsastaðni fullfermd við vápnum og aðrari hernaðarútgerð, meðan onnur eru fylgiskip hjá amerikanskum herskipum. Øll tey 29 skipini sigla undir amerikanskum flaggi eins og tey 25 skipini hjá amerikanska felagnum Maersk Inc., sum er dótturfelag hjá A. P. Møller.

VIÐMERKINGAR

# Uttanlandsnevndin

**Fyri Javnaðarflokkin**
Jóannes Eidesgaard og
Kristian Magnussen

**Fyri Sambandsflokkin**
Edmund Joensen og
Heðin Mortensen

Umboð Javnaðarfloksins og Sambandsfloksins í uttanlandsnevndini vilja við hesum skrivi gera vart við sína misnøgd í sambandi við handfaringina av málinum um at geva amerikonskum hernaðarflogførum loyvi til at flúgva í føroyskum loftrúmi og til annað virksemi á føroyskum øki.

Løgmaður og formaðurin í uttanlandsnevndini hava við síni lorkasligu viðgerð sett løgtingið í eina óneyðuga- og sera píniliga støðu. Eingin ivi tikist vera um, at Føroya løgting hevði tikið undir við málinum, sum er at standa øksl móti øksl ímóti yvirgangi. Men av berum kleyvarskapi frá løgmanni og formanninum í uttanlandsnevndini slapp løgtingið ikki at vísa medábyrgd fyri umheiminum. Hetta er sera álvarsligt brot á álitið ímillum løgtingið og landsstýrið, og hetta má fáa avleiðingar, so at støðan ikki endurtekur seg. Hvørjar avleiðingar hetta eigur at fáa, má løgtingið avgera.

Forsøgan er í stuttum hendan: NATO-londini vóru samd um, at hendingarnar í New York tann 11. september komu undir grein 5 í Washington sáttmálanum, sum sigur, at álop á eitt NATO-land er at rokna sum álop á øll NATO-lond. NATO hevur síðani, sum eina avleiðing av yvirgangsatsóknini aktiverað grein 5 í Washington sáttmálanum.

Danska stjórnin sendi tann 4. oktober kl. 1415 (ígjøgnum ríkisumboðið) fyrispurning um loyvi til at flúgva ígjøgnum føroyskt loftrúm og annars tað neyðuga, sum støðan møguliga krevur.

Sum skilst komu boðini ikki til uttanlandsnevndina fyrr enn seint á kvøldi, sum svarfreistin varð sett til kl. 13 dagin eftir. Løgmaður, sum var á fjalli, ómakaði sær ikki annað enn at biðja embætisfólk fáa boðini víðari til formannin í uttanlandsnevndini.

Formaðurin í uttanlandsnevndini gjørdi seint á kvøldi eina lítið umhugsaða roynd at fáa nevndina saman. Staddur í Suðuroy var eisini roynd gjørd at skipa fyri telefonfundi, men einki av hesum eydnaðist.

Orsøkin til at einki bar til er tann, at boðini frá landsstýrinum vóru ikki nóg greið, fleiri limir í uttanlandsnevndini vistu als einki um málið fyrr enn dagin eftir, skrivið frá uttanríkismálaráðnum og tíðarfreistin fyri einum aftursvari vóru als ikki kend, og tíðin heimilaði ikki vanligum fundi.

Um leiklutin hjá løgmanni og formanninum í uttanlandsnevndini í hesum álvarsmáli er neyðugt at siga, at makan til kleyvarskap, skal ein leita væl og leingi eftir. Løgmaður og formaðurin í uttanlandsnevndini hava sjálvsagt alla ábyrgdina av, at uttanlandsnevndin verður tikin uppá ráð í eini slíkari kreppustøðu.

Eingin ivi kann vera um, at løgmaður í slíkari støðu beinanvegin átti at sett seg í samband við limirnar í uttanlandsnevndini. Hann átti persónliga at havt avtalað fund við formannin í uttanlandsnevndini, og hann átti somuleiðis at komið á fund í uttanlandsnevndini, fyri at greitt frá málinum, sum var av serligum- og av sera týdningarmiklum slag. Hann átti eisini, um neyðugt, at havt samband við uttanríkisráðið.

Støðan sum tikin varð, átti at havt útgangsstøði í eini avgerð hjá uttanlandsnevndini, har allir flokkar á tingi hava umboðan.

Mælt verður til, at uttanlandsnevndin umboðandi flokkarnar á tingi, í felag boðar løgmanni frá síni niðurstøðu, sum samstundis setir tingini greitt uppá pláss.

# Orðini ”FÓLKIÐ FYRST” eru bókstaviliga meint

**Burtur úr kjaki á heimasíðu Javnaðarfloksins**

**Hans Jørgensen**

Tá valskrá okkara varð gjørd, varð sjálvsagt eisini gjølla viðgjørt, hvussu ætlanin búskaparliga skuldi skipast.

Men legg merki til, at valskrá Javnaðarfloksins er politikkur, og politikkur er viljin at gera broytingar. Eingir Friedmann- ella Caragata serfrøðingar stýra okkara politiska vilja.

Sjálvsagt hevði tað verið léttari at gjørt broytingarnar, um landsstýrissamgongan ikki forkom okkum ein alt ov stóran part av donsku ríkisveitingini. Men ver vísur í, at tá veljararnir hava givið okkum álit at gjøgnumføra valskránna, so verður hon fullførd:

*Pensjónin fer upp á 10.000 til støk og 16.000 til hjún um mánaðin.*

*Í minsta lagi 160 ellis- og røktarheimspláss komandi fýra árini*

*Ein betri skúli - Børn og ung eru framtíðin*

o.s.fr.

Var tað okkara politiski vilji at seta fullveldi fremst og síðan vælferðina hjá øllum føroyingum, so høvdu vit eisini ført tað út í lívið. Men hetta er ikki okkara politiski vilji – Vit vilja ”FÓLKIÐ FYRST”, alt annað kemur í aðru røð.

Búskaparætlan okkara verður kunngjørd, tá tann tíð kemur. Men ivist onga løtu ivast í, at ætlan okkara kann fullførast og verður veruleiki, tá veljararnir geva okkum møguleikan.



# BRÆV
# til forseta U.S.A.´s

Góði George W. Bush.

Fyrst av øllum má eg siga tær
mína djúpu samkenslu við
tí sorgarleiki
sum fór fram, tá ið illgerðarfólk framdu
óbótaligu illgerð sína
henda lagnudagin
11.september -
W.T.C., sum hoknaði niður og øll tey
sakleysu, sum lótu lív -
tað var gott, at tú
sjálvur og onnur sluppu undan við
lívinum.

Eg var heppin at síggja teg á
sjónvarpsskíggjanum, tá ið tú helt
røðu til tjóðina -
eg hoyrdi røðu tína sum var hon ikki bert til
amerikonsku tjóðina, men eisini til
mín og til
allar tjóðir og til
øll í øllum heiminum -
tí fyri mær var illgerðin ikki bert framd móti
U.S.A., men eisini móti øllum heiminum.

Tað fall mær heldur tungt fyri bróstið
tá ið eg hoyrdi teg siga millum tey fyrstu orðini og
sum tú legði serligan dent á og tey vóru
RÆÐUSKÍTAR ( COWARDS ) og at hetta skuldi
HEVNAST.

Gaman í -
eg dugi at skilja at fyrsti skelkurin eftir tílíka
ógvusliga illgerð fær
onkran forseta at leypa
framav

MEN
forsetanum í heimsins máttmiklastu tjóð
sømir seg lítið
at leypa framav og at lova
ILT

Eisini sá eg á sjónvarpsskíggjanum tað, sum harmaði meg
eins og onnur -
fólk dansa á gøtunum av frøi um sorgarleikin
-
løtu seinni sá eg mynd av ungari gentu, sum segði eitt,
sum eg
mátti leggja mær í geyma
Hon segði:
nú eru tað
tit amerikanarar, sum eru fyri eini
øgiligari og ófatuligari illgerð og tit mugu tola teir
ræðuleikar,sum vit eru so von við
nú kunnu tit á tykkara egna skinni kenna, hvussu
tað er at hava tað
sum vit -
ALTÍÐ
at vera fyri órætti
at vera eyðmýkt
at vera við undirlutan

Eisini sá eg teg í sjónvarpinum biðja
GUD vælsigna
Amerika -
hevði tað ikki sømt seg betur einum máttmiklum forseta
at biðja
GUD vælsigna heimin
allan sum hann er
og biðja hann varðveita okkum
øll sum eitt

AMERIKA er kortini ikki einsamalt i
HEIMINUM og
ØLL skulu vit liva
SAMAN

HOMO SAPIENS -
er tað ikki tað heitið, okkum dámar so væl
at reypa við -
nær verða vit so mikið
búgvin


*Mynd: Reuter*

at vit kunnu sýna tað í
verki
at vit hava vit og skil
og duga at
BRÚKA tað

Í samband við henda sorgarleik hevur mangur
skilamaður sagt sína hugsan um, hvat ið frægast er at
gera fyri at forða fyri slíkum illgerðum í
framtíðini
ALLIR eru teir so rørandi samdir um
JAGSTRAN
INNRÁS
BUMBUR
HEVND

IKKI
EINUM kemur til hugs
nakar annar møguleiki

Góði George W.Bush -
eg skal lýða tær í oyrað tað
sum eg hevði hildið
hevði sømt seg betur einum máttmiklum forseta sum
tær -
at hugsa teg um
eina ferð og tvær ferðir afturat

Hvør veit um ikki okkurt hevði kunnað
komið burturúr, um ein hevði
torað at vága sær sum eina roynd at
hugsa heilt øðrvísi
ella at hugsa tað beint øvugta av tí, sum vit eru
von við

Tað, sum eg meini er, at vit eru von við
at tað illa ella tað ónda (sum summum dámar væl at siga)
sum onkur ger móti mær, skal eg
løna honum aftur -
og tað er, at tað skal eg
hevna -
eyga fyri eyga og
tonn fyri tonn

Nú er tað kortini ikki so, at eg haldi tað
at um tú ert sligin á annan kjálkan, at tú eisini skalt venda
hinum skjálkanum til

MEN
Hvat heldur tú hevði hent, um tú hevði
hugsað teg væl um og síðan hevði
kunngjørt at nú skulu vit
leggja okkum annað skinn um bak

Eg veit,at hetta ljóðar bæði
naivt og banalt og utopiskt
men
hava vit ráð til at lata nakran
møguleika standa
óroyndan

Heldur enn at lata hevndarhugin fáa
takið á okkum
skulu vit taka í
egnan barm og spyrja:
HAVA VIT GJØRT NAKAÐ SKEIVT
og spyrja aftur:
HVAT HAVA VIT GJØRT SKEIVT
og so spyrja

HVUSSU KUNNU VIT GERA TAÐ GOTT AFTUR

Tú hevur sjálvur lagt dent á, at vit fara at stríðast fyri tí
DEMOKRATISKU politisku skipanini í opna
samfelagnum
RÆTTVÍSI og
FRIÐI í heiminum

Við tí í huga, at júst við at leypa á við
jagstran
innrás
bumbum og
hevnd
so hava
ILLGERÐARMENNINIR
fingið okkum í júst ta støðu sum teir hava roynt at stýrt
okkum í -
til at
LEYPA Á -
og nú kunnu teir rættvísgera sínar egnu framhaldandi
ILLGERÐIR -
og soleiðis kunnu teir léttari fáa undirtøku frá
trúarfeløgum, sum bert bíða eftir at fáa
vatn á mylluna til at lýsa
HEILAGT KRÍGGJ

Um teir fara at spyrja
ERU TIT
SYNDAFRÍIR

kanst tú so leggja hondina á hjartað
og fyri tað amerikanska fólkið siga eitt ljómandi
JA
-
NEYVAN

Ikki man tað vera neyðugt at nevna dømi

Góði Georg W. Bush -
um tú sum ein sannur
máttmikil forseti
hevði boðað illgerðarmonnunum frá:

HOYRIÐ nú hini gomlu
eg havi hugsað meg um og eg havi eitt
TILBOÐ til tykkara
so høvdu vit fingið virðing fyri tær sum
sannan máttmiklan forseta við
DIRVI
tí tá hevði tað verið teir, sum komu í
verjustøðu og
TÚ sum hevði trumfirnar og setti
TREYTIRNAR
og tað hevði verið
TÚ sum hevði
ÁBYRGDINA

Vit mugu ásanna at vit fáa
ONGAN FRIÐ VIÐ BUMBUM
og vit fáa ongan frið uttan samráðingar og
AVTALU

Tú kanst geva teimum tað tilboð
at tú vilt lurta eftir, um teir hava nøkur
YNSKI sum tú kannst umhugsa ella um
teirra ynski er fyrst og fremst at fremja
illgerðir uttan annað endamál enn at spjaða
ÓTTA OG RÆÐULEIKA

Um teir hava eina djúpari meining um eina aðra
RÆTTVÍSA samfelagsskipan og
FRIÐ
so kanst tú siga, at vit eru altíð fúsir at royna
allar møguleikar og leiðir fyri at bøta um
teir skeivleikar, sum kunnu vera atvold til ónøgd

UM
TÚ KUNDI LOVAÐ tað, so kunnu teir illa
krúpa undan einum slíkum tilboð og
tú hevði fingið teir í eina støðu, har tú hevði
STÝRINGINA og ikki minst, at nú sýndi tú tann
NÆSTRAKÆRLEIKA sum er grundarlagið undir øllum
ÁTRÚNAÐI

Fyri hesum tiltaki hevði tú fingið

FULLA UNDIRTØKU

**Erling S**